# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Oyggjablaðið næsta mikudag:

## Runavík

# Stuðulskonsert í saltsiloini

**15. mai í ár verður áhugaverd konsert á einum ikki minni áhugaverdum staði, nevniliga í saltsilo'ini á Drelnesi.**

Higartil er komið fram, at á konsertini fara hesi at luttaka: Eivør, Teitur, Jens Marni, Terj, Martin J, Harkaliðið, Frændur, Havnarkórið og Havnar Hornorkestur. Okkurt spennandi útlendskt navn er eisini á veg, verður avdúkað.

Stuðuðlskonsertin er til frama fyri ætlanirnar at gera siloina til mentanarhús. Fyrireikararnir fegnast um stuðulin og undirtøkuna, sum føroyskir tónleikarar – og listafólk annars – hava víst ætlanini.

Jóansøkufestivalurin í fjør var skipaður sum stuðulskonsert til frama fyri saltsiloina, og varð stórur gávukekkur handaður fyrireikarunum fyri stuttum.

15. mai verður so aftur stuðulskonsert við stórum føroyskum nøvnum, umframt at eitt útlendskt navn enn er eftir at verða avdúkað.

snorri@sosialurin.fo



*Saltsilo'in skal nú standa sína roynd - og ikki minst ljóðroynd*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Byggja í Porkeri

Hóast tað eru mong ár síðani at fólkatalið í Porkeri hevur verið so lágt sum tað er nú, hevur tað ikki tikið hugin frá fólki at seta føtur undir egið borð í bygdini.

Í dag búgva um 340 fólk í bygdini, ímóti 416, tá tað var uppá tað mesta í 1992.

Hinvegin so kann ein túrur gjøgnum Porkeri staðfesta, at nógv rættiliga nýggj sethús eru her, eins og - sum myndin vísir - eini sethús standa í gerð í løtuni í Hólinum, tey kalla.

snorri@sosialurin.fo



*Vónir áttu at verið fyri, at fólkatalið í Porkeri kann fara at vaksa aftur, nú eini sethús standa í gerð*
Mynd: Jens Kristian Vang

Orð: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

# Trý í handlinum

**Eitt av heitu evnunum í Suðuroynni er, hvørt oyggin skal leggjast saman í eina einstaka kommunu. Ella um oyggin framhaldandi skal hava tvær ella fleiri kommunur.**

**Fyri at hoyra fólksins rødd í hesum máli, hittu vit trý fólk, ið vóru farin til handils. Spurningurin var hesin: *Skal Suðuroyggin verða ein kommuna?***



*Ja, tí at samlað fær ein meiri burturúr*

***Elvis Leo, Froðba***



*Nei, tí vit kunnu ikki einast*

***Jonna Lindberg, Trongisvágur***

*Ja, tí vit eru so fá fólk í oynni. Vit treingja til meiri samband millum bygdirnar*

***Rannvá Joensen, Froðba***

